# Minningarorð um mín góða pápabeiggja Kaisten Andreasen



Ja, brádliga fór tú heim til Harran, 68 ára gamal. Vit høvdu planlagt eina stóra familjufest í Fuglafirði í juli mánað.

Tú fórt til Íslands sum 15 ára gamal á Bóndagarð. Har bleiv tú verandi, fekk eina góða konu og trý børn.

Harrin gevur, Harrin tekur øll til sín.

Friður verður við minni tínum.

**Hanstholm**
**28. juni 2006**

**Tórhallur**

Tjaldurs Apotek:

# Tríggir farmakonomar fingið prógv

29. juni 2006 fingu Sylvia Henriksen, Katrin Simony Knudsen og Barbara Brattaberg prógv sum farmakonomar á Tjaldurs Apoteki í Havn.

Útbúgvingin sum farmakonomur tekur trý ár. Ein partur av útbúgvingini er á apotekunum í Føroyum, meðan skúlin er í Hillerød í Danmark, har næmingarnir eru sjey ferðir í tey trý árini, útbúgvingin tekur.



*Farmakonomar sum fingu prógv 29. juni 2006 f.v. Katrin Simony Knudsen, Sylvia Henriksen og Barbara Brattaberg*

# Øregaard 100 ár

Í gjár, hósdagin 29. juni 2006, vóru 100 ár síðan ein av okkara kendastu politikarum, Jákup Frederik Øregaard, løgtingsmaður, varð føddur í 1906.

Jákup Frederik Øregaard, ella Øregaard, sum hann vanliga varð nevndur var leirvíkingur, men búsettist í Norðragøtu.

Øregaard var løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin, valdur í Eysturoyar valdømi og sat á løgtingi frá 1940 til 1978. Hann var løgtingsformaður í 20 ár. Hann sat eisini í sóknarstýrinum í Gøtu í nogv ár og eitt skifti sum formaður.



Jákup Frederik Øregaard doyði í eini ferðsluvanlukku 6. mars 1980, 73 ára gamal.

# Heilsan til Signar og Hagbard Dalfoss



*Signar Dalfoss*



*Hagbard Dalfoss*

Í dag, fríggjadagin 30. juni 2006, fyllir Signar Dalfoss í Havn 60 ár, og 12. november í fjør fylti eldri bróðurin, Hagbard Dalfoss, 70 ár.

Hóast Signar og Hagbard hava búð meginpartin av lívi sínum í Havn og verða roknaðir sum havnarmenn, eru teir suðuroyingar. Foreldrini vóru Jensia og Alexander Dalfoss, hon av Sevmýri á Tvøroyri, og hann úr Froðba. Familjan búði í Froðba til 1951, tá tey fluttu til Havnar at búgva.

Umframt at teir eru brøður, hava Signar og Hagbard eisini tað til felags, at teir báðir arbeiddu hjá postverkinum meginpartin av lívi sínum, Signar arbeiddi í 36 ár og Hagbard í 49 ár. Hagbard gavst í 2000, og Signar gavst fyrr í ár. Í dag hava teir eisini tað til felags, at teir eru grannar og búgva báðir í Berjabrekku.

Signar er upprunaliga útbúgvin timburmaður, hann lærdi hjá byggifelagnum Lamhauge Waagstein. Hann fekk starv á posthúsinum 16. juli 1970 og byrjaði við at ganga við posti. Seinni arbeiddi hann í sorteringini og í virðisbúrinum. Tey síðstu árini arbeiddi hann á KT-deildini, sum er heldur sjaldsamt fyri fólk í hansara aldri. Orsøkin man helst vera, at tað liggur sera væl fyri hjá honum at arbeiða við teldum. Hann hevur eisini stóran áhuga í ættargransking og liggur inni við einum stórum databanka við upplýsingum um fólk og familjur.

Signar er giftur Kirsten, f. Joensen, dóttir Edle og Hergeir Joensen, hon úr Frederikshavn og hann úr Hesti. Hergeir var í nógv ár maskinmeistari á Loranstøðini í Vági, so Kirsten er fødd og uppvaksin í Vági. Signar og Kirsten eiga børnini Poul og Heidi, ið bæði búgva í Danmark.

Hagbard flutti til Havnar eitt ár áðrenn hini í familjuni og arbeiddi sum telegrafboð, áðrenn hann byrjaði á posthúsinum 1. juni 1951, har hann hevði ymisk størv, hann gekk við posti og koyrdi seinni pakkabilin. Seinnu nógvu árini arbeiddi hann í sorteringini. Tá hann gavst á poshúsinum eftir næstan 50 ár í starvi, hevði hann arbeitt undir 5 ymiskum postmeistarum. Svágur Hagbard, Símun Samuelsen í Hornabø, arbeiddi eisini í umleið 50 ár á posthúsinum. Í síni frítíð og eftir at hann er givin á posthúsinum er Hagbard er nógv í Saksun, har familjan hevur eini summarhús.

Hagbard er giftur Sonju, f. Simonsen, úr Saksun, dóttir Oluffu og Petur Henzar Simonsen, hon úr Saksun og hann úr Sandavági. Oda og Hagbard eiga børnini: Odu, sum býr í Kollafirði, Alexandur sum býr í Havn, og Ann, sum býr í Ljósáum.

Signar og Hagbard áttu eisini ein eldri bróður, Martin Leo, vanliga nevndur Marlo, sum búði í Keypmannahavn, hann andaðist i 2001, og eina systir, Johanna, sum býr á Amager.

Signar og Hagbard vóru góðir sum starvsfelagar á posthusinum, góðir at samstarva við, duga væl at skemta og eru sera hittinorðaðir. Signar hevur t.d. sagt, at hann varð tvangsfluttur til Havnar. Tí tá hann sum smádrongur kom til Hvanar at búgva, sovnaði hann á Tvøroyri, og visti einki til sín fyrr enn hann var í Havn.

Vit á posthúsinum ynskja okkara fyrrverandi starvsfeløgum tillukku við føðingardøgunum og alt tað besta í framtíðini.

**Fyrrverandi**
**starvsfelagar**

**Dagurin**

**1.juli. Tebaldus**, deyður ár 1066. Franskur aðalsmaður, ið á ungum árum velur eitt lív sum einbúgvi. Var fyrst í Luksemburg, ger so pílagrímsferð til Santiago de Compostela í Norðurspaniu, til Róm og fær sær at enda tilhald í Vincenza í Italiu, har hann varð prestvígdur.

**2. juli. Syftunsøka**. Hildin til minnis um enska biskupin í Winchester Swinthun, sum doyði ár 862. 15. juli ár 971 varð hann skírdur halgimenni. Dómkirkjan í Stavanger í Norra er vígd honum. Minningardagur hansara er í Onglandi 15. juli, men í Føroyum og Norra er hann tann 2. juli, sum var deyðadagur hansara. Tað er tí helst úr Norra, at syftunsøkudagur er komin higar. 2. juli er eisini ein gomul mariumessa, vitjunardagur Mariu, til minnis um at Maria Moy vitjaði skyldkonu sína Elisabeth, móðir Doyparans. Niels Winther var føddur hendan dagin í 1822.

**3. juli. Kornelius**. Mong eru halgimenni, sum bera navnið Kornelius, men teir vita ikki við vissu, hvør hesin er. Summir halda, at talan er um pávan Kornelius, sum varð tikin av døgum ár 253. Aðrir siga, at sipað verður til høvuðsmannin Kornelius, sum var fyrsti heidningur, ið var doyptur. Ápostlasøgan kap. 10. Navnið er latínskt ið kemur av orðinum cornu, ið merkir horn.

**50 ár**
Sunnudagin 2. juli verður Jónfríð Jacobsen, Tórshavn, 50 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Jónfríð eru vælkomin í høli hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9, leygardagin 1. juli frá kl. 19.00.

**75 ár**
Mánadagin 3. juli verður Jógvan Petersen Kollafjørður, vanliga nevndur Jógvan SEV , 75 ár. Hann verður burturstaddur.

**80 ár**
Mánadagin 3. juli fyllir Birgit Hestoy á Tvøroyri 80 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 2. juli, saman við familju og vinum, á Garðsgøtu 1, Argir.